## Suu Kyi latast leys

Andstøðuleiðarin í Myanmar, Aung San Suu Kyi, verður latin leys, tá húsavarðhald hennara rennur út í november. Tað sigur generalurin Maung Oo, sum er ráðharri í hernaðarstjórnini í Myanmar. Eisini næstformaðurin í andstøðuflokkinum, tann 82 ára gamli Tin Oo, verður latin leysur. Hann hevur sitið í húsavarðhaldi í tíggju ár, men verður væntandi latin leysur í vár. Aung San Suu Kyi hevur verið í fongsli og húsavarðhaldi í 14 av teimum seinastu 20 árunum. Í august í fjør varð hønd dømt at sita í húsavarðhaldi í 18 mánaðir afturat, tí ein amerikanari svam yvir um eitt vatn til hús hennara.



# Suðuroyar sjúkrahús hongur í klønum tráði

**- Vit arbeiða hvønn dag fyri at halda nøsina omanfyri vatnskorpuna, men tað var eitt alvorligt bakkast at Løgtingið ikki vildi taka undir við eini framrættaðari loysn, sum vit hava sett saman, sigur Hans Petur Nielsen, yvirlækni á Suðuroyar Sjúkrahúsi**

HEILSUVERKIÐ
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*



*At lata Landssjúkrahúsið fáa allan avgerðarrættin yvir játtanini til serviðgerð uttanlands, er sum at seta revin at ansa eftir gæsnum, heldur Hans Petur Nielsen, yvirlækni á Suðuroyar Sjúkrahúsi*

- Vit hava onki ímóti at samstarva. Men samstarv skal ganga báðar vegir.

Hans Petur Nielsen, yvirlækni á Tvøroyri stúrir fyri framtíðini hjá Suðuroyar Sjúkrahúsi og kommunulæknaskipanini í oynni.

Hann sigur, at hendir onki heilt skjótt, er stórur vandi fyri, at alt heilsuverkið í Suðuroy dettur sundur.

Tað eru tey tiltøk, sum heilsumálaráðið fór undir síðsta summar, sum elva til stúran.

Men ikki minst stúrir hann fyri avleiðingunum av, at samgongan ikki vildi taka undir við einum uppskoti frá øllum læknunum í Suðuroynni um, hvussu trupulleikin kann loysast.

### Leggjast undir Landssjúkrahúsið

Síðsta summar gjørdi heilsumálaráðið av, at hereftir skal Landssjúkrahúsið umsita alla játtanina til serviðgerð uttanlands.

Í hesum sambandi er ein menningarstjóri settur í heilsuverkinum, sum skal hava ein ávísan myndugleika yvir øllum trimum sjúkrahúsunum.

Yvirlæknin í Suðuroy stúrir fyri, at hetta fer at geva Landssjúkrahúsinum vald yvir teimum smáu sjúkrahúsunum.

Fyrr í vikuni staðfesti Jákup Petersen, yvirlækni í Klaksvík í Sosialinum, at samstundis fær Landssjúkrahúsið avgerðarrættin yvir, í hvønn mun, útlendskir yvirlæknar skulu takast heim at viðgera sjúklingar í Føroyum, eisini á teimum smáu sjúkrahúsunum.

### Revin ansar gæsnum

Bæði Hans Petur Nielsen og Jákup Petersen eru samdir um, at hetta fer at máa grundarlagið undan teimum smáu sjúkrahúsunum.

- Tað er óskiljandi fyri okkum, hví Landssjúkrahúsið skal umsita alla játtanina, tí tey smáu sjúkrahúsini senda so fáar sjúklingar til serviðgerð uttanlands, at tað munar lítið í samlaðu játtanini.

- Hinvegin kunnu vit eisini staðfesta, at er tað nakar í føroyska heilsuverkinum, sum hevur havt trupulleikar við at stýra fíggjarviðurskiftunum, er tað júst Landssjúkrahúsið.

- Tí má tað sigast at vera eitt stórt álit at vísa Landssjúkrahúsinum at geva teimum 130 milliónir afturat at umsita.

- Tað er sum at seta revin at ansa eftir gæsnum, leggur hann afturat.

Í kjalarvørrinum á hesum, er eisini ætlanin at gera eina samstarvsavtalu ímillum tey trý sjúkrahúsunum.

Hans Petur Nielsen heldur, fremsta endamálið við hesi avtaluni er at sementera myndugleikan hjá Landssjúkrahúsunum yvir teimum smáu sjúkrahúsunum og tað uppfata teir báðir hálvavegna sum deyðadómin yvir sjúkrahúsið í Klaksvík og á Tvøroyri.

Jákup Petersen førdi fram, at hetta var eitt rættiligt kvett, sum varð framt ímóti teimum smáu sjúkrahúsunum, tí avgerðin varð tikin knappliga síðsta summar, ímeðan umboð fyri Suðuroyar Sjúkrahús og Klaksvíkar Sjúkrahús vóru uttanlands og sostatt ikki fingu møtt á fundi um viðurskiftini.

Hetta váttar Hans Petur Nielsen.

- Ja, tað var akkurát soleiðis, at tað fór fram, sigur yvirlæknin í Suðuroy.

### Vísa samstarv í verki

Hans Petur Nielsen sigur, at hann hevur onki ímóti, at ein samstarvsavtala verður gjørd ímillum tey trý sjúkrahúsini.

Men hann dugur ikki at síggja, hví hon er neyðug, tí longu í stykki eitt í sjúkrahúslógini stendur svart á hvítum, at tey trý sjúkrahúsini hava skyldu til at samstarva og at veita hvørjum øðrum hjálp.

Men í nýggju samstarvsavtaluni, sum er gjørt, stendur onki ítøkiligt um, hvussu tey trý sjúkrahúsini skulu samstarva.

- Talan er um eina yvirskipaða ætlan, sum ein menningarstjóri skal standa fyri.

Og vit stúra fyri, at við hesi samstarvsavtaluni í hondini fer tað at bera til so við og við at leggja tey bæði smáu sjúkrahúsini inn undir Landssjúkrahúsið.

Hinvegin saknar yvirlæknin í Suðuroy, at sokallaða samstarvið ímillum tey trý sjúkrahúsini verður víst í verki.

- Suðuroyar Sjúkrahús fær sjúklingar úr Klaksvík og frá kommunulæknum kring landið, men landssjúkrhúsið sendir ongar sjúklingar suður.

- Landssjúkrahúsið vil heldur fáa læknar uttanlands heim til Føroyar enn at brúka ta vitan, sum longu er í landinum.

Hans Petur Nielsen sigur, at tað eru nógvar smáar og miðalstórar skurðviðgerðir, sum kundu verðið avgreiddar á Suðururoyar Sjúkrahúsi.

- Eisini á hansara egna øki, sum er hjartasjúkur, verða heldur en ørgrynna av vikarum fluttur heim til Føroya úr útlandinum at viðgera sjúklingar ístaðin fyri at brúka meg og tað vitan, sum annars longu er í landinum.

Hans Petur Nielsen sigur, at hann hevur játtað fyri læknum á Landssjúkrahúsinum og heilsumálaráðnum at vera til hjálpar, tá ið á stendur, men tað kemur bara ongin áheitan.

- Og so skulu vit harafturat standa modell til, at Landssjúkrahúsið skal hava eykajáttan fyri at fáa játtanina at halda.

## Mangla fýra læknar í Suðuroy

Skal heilsuverkinum í Suðuroy verða lív lagað, verður neyðugt at tað almenna játtar pening til at seta narkosulækna og yngri læknar á Suðuroyar Sjúkrahúsi.

Tað sigur Hans Petur Nielsen, yvirlækni á Suðuroyar Sjúkrahúsi.

- Tað sum brúk er fyri, er, at heilsuverkið í Suðuroy fær 4,5 - 5 til fimm milliónir afturat til ein narkosulækna og til yngri læknar.

Talan er um trý nýggj størv til yngri læknar.

### Framrættað loysn

Eitt argument ímóti hesum hevur verið, at tað hevði verið ov lítið hjá yngru læknunum at gjørt og at teir tí ikki høvdu viljað arbeitt í Suðuroy.

Men hetta er ikki beint, sigur Hans Petur Nielsen.

- Vit høvdu snikkað eina framrættaða loysn saman, sum bæði hevði givið yngri læknunum nóg mikið av arbeiði og sum samstundis hevði bøtt munandi um arbeiðsumstøðurnar hjá kommunulæknunum og yvirlæknunum.

Tað hevði hjálpt munandi um støðuna, tí eftir vanliga arbeiðstíð kundu yngri læknarnir átikið sær nógv arbeiði við kommunulæknunum og yvirlæknunum á Sjúkrahúsinum sum bakvakt og tað hevði lætt nógv um arbeiðsbyrðuna.

- Høvdu vit fingið játtanina til narkosulækna og yngri læknar, hevði tað stabiliserað støðuna.

Ístaðin fyri at seta pening av til hesa játtanina, vil heilsumálaráðið hava Suðuroy upp í vaktarskipanina, sum er galdandi fyri restina av landinum og har ein lækni situr á landssjúkrahúsinum og tekur telefonina um kvøldið og um vikuskifið.

- Hetta hjálpir so lítið, tí tað vera kortini kommunulæknarnir, sum skulu koyra heim til sjúklingin ella á sjúkrahúsið, hvørja ferð, tað er neyðugt, ístaðin fyri at tað var ein hjálparlækni, sum tók sær av honum við kommunulæknanum og serlækna sum bakvakt.



*Allir læknarnir í Suðuroy hava snikkað eina framrættaða loysn saman, sum stabiliserar sjúkrahúsið og kommunulæknaskipanina, men hingartil er ongin undirtøka, sigur Hans Petur Nielsen, yvirlækni*